Páll á Reynatúgvu, løgtingsformaður
Føroya Løgting
Tinghúsvegur 1
100 Tórshavn

Tórshavn 9. apríl 2019

**Ískoytistilmæli**

Løgtingið hevur reist nakrar spurningar viðvíkjandi fráfaringarsamsýning til varamenn á løgtingi í sambandi við løgtingsmál nr 110/2018, sum er evnað til eftir tilmæli frá nevnd, sum varð vald at endurskoða løgtingslóg um samsýning og eftirløn løgtingsmanna.

Løgtingsskrivstovan hevur tí vent sær til nevndina við fyrispurningi, um til ber at greina hesi viðurskifti nærri.

Nevndin hevur út frá hesi áheitan havt tveir fundir og gjørt hetta ískoytistilmæli, har nøkur viðurskifti viðvíkjandi varamonnum verða nágreinað.

Ein spurningur var viðvíkjandi § 3 stk 2 í núverandi lógaruppskot løgtingsmál 110/2018, har mett verður at ógreiða er um, nær nevndin hugsar sær, at varalimur skal sita á tingi fyri at fáa fráfarðingarsamsýning.

Annar spurningur var, um nevndin hevur umrøtt, hvussu skal vera við fráfaringarsamsýning til varamann fyri landsstýrismann, sum má fara úr tinginum, um landsstýrismaður fer frá og kemur aftur í tingi mitt í einum valskeiði.

**Hesir báðir spurningar eru umrøddir í nevndini, og hevur nevndin hesi tilmæli:**

**Nevndin mælir til,** at um varamaður hevur sitið á tingið í meira enn 3 mánaðir og hevur sitið seinastu 30 dagarnar, áðrenn løgtingsval verður útskrivað, og ikki verður valdur, skal hann hava fráfaringarsamsýning

**Nevndin mælir til**, at varamaður, sum fer úr tinginum, tí landstýrismaður fer frá og kemur aftur í tingið, fær fráfaringarsamsýning eftir ávísum reglum.

**Mælt verður til** at § 3, stk. 2 í lógaruppskotinum verður orðað soleiðis:
"*Varamaður, sum hevur havt sæti á tingi í meira enn 3 mánaðir samanlagt í einum valskeiði, og sum hevur havt sæti á tingið seinastu 30 dagarnar, áðrenn løgtingsval verður útskrivað, og sum ikki verður valdur, fær fráfaringarsamsýning eftir § 1, stk. 1, svarandi til 1 dag fyri hvørjar 16 dagar, viðkomandi hevur havt sæti á tingi, tó í mesta lagi í 6 mánaðir.*"

**Mælt verður til**, at § 3 fær eitt nýtt stk. 3, sum verður orðað soleiðis:

*"Varamaður, sum hevur havt sæti á tingi fyri landsstýrismann í meira enn 3 mánaðir, og sum fer frá, tí landsstýrismaðurin tekur við aftur sum løgtingsmaður, og sum ikki hevur rætt til fráfaringarsamsýning sambært § 3, stk. 2, fær fráfaringarsamsýning eftir § 1, stk 1, tá hann fer frá, svarandi til 1 dag fyri hvørjar 16 dagar, viðkomandi hevur havt sæti á tingi fyri landsstýrismann, tó í mesta lagi í 6 mánaðir".*

**Mælt verður til,** at § 3, fær eitt nýtt stk 4 verður orðað soleiðis:
*"Varamaður kann bert fáa fráfaringarsamsýning eina ferð fyri sama tíðarskeið, sum hann hevur sæti á tingi."*

**Mælt verður til,** at § 3, stk 2 annað punktum, sum byrjar við:
" *Hevur varamaður aðra lønarinntøku....*" verður nýtt stk 5.

Fær varamaður fráfaringarsamsýning sambært stk 3 (tí landsstýrismaður fer frá og kemur aftur í tingið), skal hann ikki hava sæti á tingið í 3 mánaðir afturat fyri at fáa fráfaringarsamsýning eftir stk.2 (í samband við at val verður útskrivað). Sambært stk. 4 fær hann bert fráfaringarsamsýning eina ferð fyri sama tíðarskeið.

Dømi: Um tingmaður tíðliga í valskeiðinum hevur sitið fyri landsstýrismann í 3 mðr., fer út og fær fráfaringarsamsýning tá, fær hann samsýning samb. § 3, stk. 3. Seinni í valskeiðnum situr hesin aftur á tingi m.a. seinasta mánaðin, áðrenn val verður útskrivað. Hesin fær so fráfaringarsamsýning eftir § 3, stk. 2 fyri ta tíðina, sum hann ikki hevur fingið fráfaringarsamsýning fyri áður, men av tí, at hann fyrru ferð sat á tingi í 3 mðr. so er hendan treytin ikki longur aktuel fyri seinna skeiðið. Tá er einans neyðugt at sita seinasta mánaðin, áðrenn valið verður útskrivað.

Við heilsan

Jógvan Amonsson | Maria á Dul | Gunn Ellefsen